# ÁRIÐ HJÁ FISKIMONNUM

## Ársfrágreiðing Føroya Fiskimannafelags fyri 2009



**Løgd fram á landsfundi 29. desember 2009**

Føroya Fiskimannafelag

Ársfrágreiðing Føroya Fiskimannafelags fyri 2009
Útgevari: Føroya Fiskimannafelag
Uppseting og lagt til rættis: Føroya Fiskimannafelag
Upplag: 400 eintøk
Myndir: Ólavur av Váli
© Føroya Fiskimannafelag



## Inngangur

Árið 2009 hevur verið merkt av vánaligum prísi fyri tosk og hýsu, umframt at onnur fiskasløg eisini eru minkað í virði. Hetta hevur serliga línuflotin kent sviðan av, men eisini garnaskipini og langfaraskipini hava merkt heimskreppuna gera vart við seg.

Nótaskipini og ídnaðarskipini hava munandi minni kvotu at fiska av svartkjafti, umframt at prísurin av makreli er fallin, so har er inntøkan minkað munandi. Rækjuflotin hevur selt fyri nakað slakari enn árið framanundan, men oljan hevur kostað minni, so tað er ikki tann heilt stóri inntøkumissurin hjá rækjumanningunum.

Hjá samlaða trolaraflotanum hevur tað tíbetur gingið tann rætta vegin. Har hevur tað verið so heppið, at upsaprísurin hevur hildið sær, og av tí at fiskiskapurin eftir upsa hevur verið sera góður fyrru hálvu, so hevur inntøkan eisini verið í lagi.

Tað eru framvegis skipabólkar og einstøk skip, sum hava góðar inntøkur, men miðalinntøkan hjá sjófólkinum er minkað heilt nógv seinastu árini. Talið á sjófólki er eisini nógv minkað síðani 1990'unum.

## Arctic Viking

Síðani eg tók við sum formaður, hevur ávíst uppruddingararbeiði verið at gjørt í Fiskimannafelagnum. Tað hava verið fleiri sáttmálalbrot, sum hava ligið óviðgjørd, sum tikin er upp – eitt teirra er málið um Arctic Viking. Málið snýr seg um, at sjófólkini hjá FF, sum mynstraði eru við skipinum, ikki hava fingið sín part av hýruni.

Nakrir litavar komu við skipinum uttan at mynstra sum vanlig manning. Tey, sum mynstraðu, fingu minni hýru, tí partarnir hjá litavunum var drigin frá, men hvørja løn litavarnir hava fingið, vita vit ikki. P/F Líðin vil ikki út við prógvunum. Tað kom dátt við, at vit taptu hetta upplagda sakarmálið móti P/F Líðini í Føroya Rætti. Málið skuldi verið sera lætt og nemt at avgreitt, tí bæði sáttmálar og Føroya Løgting hevur samtykt, at tað skal ikki gerast mismunur á fólki.

Hesin dómur gongur greitt móti tí politiska viljanum, sáttmálanum, lógum landsins og vanligari hugsan um mannarættindi. Tað er sera sjálsamt, at rætturin var ikki áhugaður í, um reiðarin hevði hildið landsins lógir í hesum sambandi. Sakførari okkara vísti







á, at hvørki Føroya Fiskimannafelag ella TAKS høvdu fingið nakað prógv fyri, at nakar av hesum monnum høvdu fingið nakað sum helst, og at reiðarin kann hava koyrt allan peningin í egnan lumma.

Um hetta verður gongdin, kann tað kollsigla føroyska búskapin, tí einum reiðara nýtis als ikki at gjalda løn ella halda teir sáttmálar, hann hevur skrivað undir. Um vit føra hetta víðari, kann tað eisini merkja, at aðrir arbeiðsgevarar, bæði innan tað almenna og tað privata, kunnu nýta henda leist.

Sum felag noyðast vit at verja borg, tí er ein skriða fyrst lopin, so er onnur væntandi. Fiskimannafelagið kann ikki byrja at góðtaka, at skipini taka manningar við, sum ikki mynstra eftir vanligum reglum, og har vit ikki vita, hvør lønin er. Vit hava tí eisini lagt málið um Arctic Viking fyri Eystara Landsrætt, og stendur tað til mín, so skulu vit víðari í Hægstarætt um neyðugt, tí hetta er eitt sera prinsipielt mál. Hetta vóni eg eisini, at landsfundurin tekur undir við.

## FAS

Vit hoyra javnan í fjølmiðlunum, at FAS er ein frálíka góð skipan, og tað er hon helst eisini fyri skipafeløgini, men fyri okkara limir hevur FAS ikki verið nøktandi. Tað, at skattingin av FAS'arunum var broytt, gjørdi, at fleiri av okkara limum fóru niður í løn. Vit hava gjørt vart við hetta, og hava bøtt uppá hetta við sáttmálasamráðingum, men vit eru ikki komin á mál enn.

Tað vanlukkuliga er eisini hent, at eftirlønarviðurskiftini hjá FAS'arunum ikki er komin í rættlag. FAS'arnir fáa 8% í eftirløn, men trupulleikar hava verið hjá FAS'arunum at fáa somu skattafyrimunir, sum aðrir løntakarar, tá ið teir fáa eftirløn.



Hetta kann tykjast margháttligt, serliga havandi í huga, at landstýrið arbeiðir við eftirløn til allar føroyingar.

FAS-skipanin og sáttmálin, sum hann er í løtuni, ger, at limirnir í Sjómannadeildini eru vorðin ein stætt, sum er við skerdan lut á fleiri økjum. Henda skipanin hevur eisini rakt bæði landskassan og komunur hart, tí her kemur ongin skattur inn til teirra heldur.

Vit mugu fáa ígjøgnum nakrar FAS-lógarbroytingar, umframt at ásetingar mugu broytast í sáttmálunum, so at tað verður hugaligt hjá limum okkara at vera undir FAS-skipanini.

## FMU

Faroese Maritime Unions er yvirskipaður felagsskapur, sum manningarfeløgini hava skipað seg í. Hesin felagsskapur kemur at taka sær av sáttmálum fyri útlendingar og føroyingar, sum sigla undir FAS. Endamálið er sjálvandi at fáa so góðar sáttmálar fyri manningarfeløgini, sum til ber.

## ALS og arbeiðsloysið

Í vár varð ALS-skipanin broytt soleiðis, at arbeiðsloysisstuðulin hækkaði munandi. Gerast limir okkara arbeiðsleysir, hava teir møguleika at fáa 80% av síni løn endurgoldið – tó í mesta lagi 20.000 kr. um mánaðin. Eg haldi ikki, eg taki munnin ov fullan, tá ið eg sigi, at hetta má vera ein hin besta arbeiðsloysisskipanin í heiminum hesum viðvíkjandi, men ALS-skipanin er ikki nóg góð á øllum økjum.

Ein onnur lógarbroyting í vár var, at møguligt skuldi vera hjá sjófólki at fáa úr skipanini, um skip teirra er til umvælingar. Hóast ásetingarnar á pappírinum síggja út til at vera góðar, so vísir tað seg at vera sera trupult at fáa pening út har, hóast fiskimenn lúka øll krøv. Tá ið sjófólk skulu hava útgjald eftir nýggju skipanini, skulu teir hava váttan frá bæði reiðara og tí, sum umvælir skipið. Hetta hevur ikki altíð víst seg at vera serliga lætt. Tað er onki at taka seg aftur í at siga, at fiskimenn mangan kenna seg við skerdan lut, tá teir skulu hava eitt oyra úr ALS.

Sjálvur havi eg fingið sæti í stýrinum í ALS, so hetta er avgjørt eitt av málunum, ið vit mugu arbeiða víðari við, tí tað skal gerast lættari hjá sjófólki at fáa úr ALS, tá ið skip liggja til umvælingar. Tá ið tað snýr seg um at fáa vanligt arbeiðsloysisgjald fyri arbeiðsleys sjófólk, so skuldi skipanin verið í lagi. Vit mugu bara áhaldandi minna okkara fólk á at minnast til at melda seg inn í ALS beinanvegin, um tey eru somikið óheppin, at tey gerast arbeiðsleys. Sjófólk, hvørs skip eru til umvælingar, mugu eisini minnast til at melda seg inn í ALS beinanvegin.

Um arbeiðsloysið sum heild er annars at siga, at tað er fleirifaldað upp á eitt ár. Arbeiðsloysið var fyri einum góðum ári síðani niðri á gott 300 fólkum, men í dag eru 1500 fólk arbeiðsleys – herav ein partur sjófólk. Um hugt verður at arbeiðsloysistølunum sæst m.a. eisini, at 80% av teimum, sum eru arbeiðsleys, eru fólk, sum arbeiða innan tær ófaklærdu vinnurnar á sjógvi og landi. Hetta eru órógvandi hagtøl.

## Næraberg

Tá januar mánaður var komin í helvt, varð







boðað frá, at FF ikki hevði í hyggju at leingja royndarsáttmálan fyri Næraberg, sum var uppá 17,5%. Eykaloyvið varð givið sum partur av einari semju við reiðaran á Nærabergi, soleiðis at manningin á Carlton fekk tað, teir høvdu til góðar hjá sama reiðara.

Tað gjørdist tó skjótt greitt, at reiðarin ikki var sinnaður at halda síni lyftir, tí vóru ikki fyritreytir fyri leingja fyribilsavtaluna. Tá FF gjørdi avtaluna, fingu vit at vita, at skipið bara skuldi fiska stutta tíð, fyri síðani at verða skift út við eitt verksmiðjuskip. Endin var, at FF játtaði, at Næraberg fekk longt eykaloyvið til 1. des. í ár.

## Samlagstrygging

1. januar í ár broyttu vit okkara samlagstrygging og gjørdu eina avtalu við ALKA-tryggingina. Vit hava nú í eina tíð roynt ta nýggju samlagstryggingina, og vit eru sera væl nøgdir við hana. Hon vísir seg at virka munandi betur enn hin gamla tryggingin, og hon er bíligari. Gjøgnumskygnið er eisini blivið betur. Vit fáa eisini fylgt við inngjaldi og útgjaldi, og hvat tryggingin kostar í umsiting. Sum tað eisini verður greitt frá seinni, so fáa vit í ár eisini eitt stórt bonus afturgoldið, tí sera fá hava havt brúk fyri tryggingini í ár.

Samlagstryggingin, ið vit hava, er, at limir okkara eru tryggjaðir við deyða og álvarsama sjúku, børn eru tryggjað við álvarsama sjúku, og hjúnafelagin er tryggjaður. Eisini hava vit eitt lokagjald, sum er ein eingangsupphædd, sum allir limir, sum gerast 67 ár, og sum lúka treytirnar, fáa. Lokagjaldið er 75.000 kr. skattafrítt. Hetta er ein upphædd, sum veruliga munar hjá sjómanninum, og er ein háttur at bera í bøtuflaka fyri, at vit ikki hava fingið eina nóg góða eftirløn enn.

Tað er tó harmiligt, at ikki allir lúka treytirnar fyri at fáa eina lokaupphædd, men hetta varð tað, sum nevndin og ALKA kundu semjast um. Vit fara at leggja okkum eftir at betra um henda partin av okkara trygging alla tíðina.

Samstundis sum vit hava fingið eina nýggja trygging, gjørdu vit í summar eina tryggingaravtalu við hini feløgini í Samtak – Føroya Arbeiðarafelag og Havnar Arbeiðsmannafelag – um, at limir okkara frítt kunna ferðast ímillum

feløgini, men varðveita sína trygging í upprunafelagnum, um viðkomandi hevur nátt ein ávísan aldur. Avtalan tryggjar, at limirnir í hesum feløgunum ikki missa rættin til lokagjaldið, hóast teir ferðast ímillum sjógv og land.

Avtalan kom í gildi 1. juli í ár, og tað stóð, at vit skuldu endurskoða avtaluna, men eg haldi, at allir partar eru somikið væl nøgdir við hesa avtalu, at hon heldur fram. Vónandi fer tað at eydnast okkum at víðka Samtak og eisini gera tryggingaravtalu við onnur feløg – eitt nú arbeiðarafeløgini í Klaksvík.

## Lógarkravda tryggingin

Tann lógarkravda tryggingin er enn ikki nøktandi. Tað vísir seg at vera eitt øgiligt baks at fáa eitt oyra, fyri ikki at siga ómøguligt, um ein ikki hevur orku at krevja sín rætt. Vit mugu alt ov ofta stevna tryggingini, tá fiskimenn fáa mein umborð, hóast tað eftir okkara tykki er púra greitt, at tryggingin skal veita teim skaðaraktu tryggingargjald. Hetta má og skal broytast.

Tíbetur er tað hent, at nýggj vanlukku-tryggingarlóg var samtykt í vár, sum kemur í gildi 1. januar 2010, soleiðis at upphæddirnar fyri arbeiðsskaðar og av-lamni gerast munandi hægri, og lógin er eisini betrað í aðrar mátar. Fyri at tað skuldi lata seg gera at seta alla ta nýggju lógina í gildi, vórðu 30 mió. kr. tiknar úr trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir og koyrd í ein tryggingargrunn.

Vit vóna, at nú tá ið lógin er nútímansgjørd, at tað so eisini verður lættari hjá okkara monnum at fáa sín rætt ígjøgnum uttan at muga berjast fyri hesum. Gamla lógin var frá 1966, so tað er greitt, at hon var ikki nútíðarhóskandi. Fólk, sum eru komin illa fyri av arbeiðsskaðum, mugu endiliga ikki halda seg aftur at koma til felagið, um trupulleikar eru. Vit halda eisini eyga við fleiri málum, og gera alt tað, vit kunnu, fyri at tryggja limum okkara teirra sjálv-sagda rætt. Tá ið tú ert komin til skaða, er tað ein nóg stór byrða í sær sjálvum - tað eigur ikki og skal ikki vera ein dupultbyrða, við at tú eisini noyðist at berjast við vanlukkutryggingina um hetta.

## Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir

Trygdargrunnurin fyri avreiðingar og lønir tryggjar løntakarunum løn, um fyritøkan/reiðaríið fer á heysin, um reiðarin/arb-eiðsgevarin doyr, ella um hann ikki er førur fyri at rinda lønina. Hetta er grunnur, sum serliga verður brúktur í niðurgangstíðum, tá ið nógv skip, bátar og vinnuvirki fara á heysin.

Trupulleikin við hesum grunninum hevur verið, at útgjaldið hevur verið so lágt, og freistin at søkja hevur verið so stutt. Saman við hinum feløgunum í Samtak var Fiskimannafelagið til trípartasamráðingar við landsstýrið í vár, og vit fingu skipað so fyri, at upphæddin, sum løntakarar á sjógvi og landi kunnu fáa úr trygdargrunninum fyri avreiðingar og lønir trý faldað – upp í 60.000 kr., og freistirnar at søkja vórðu eisini longdar. Hetta eru broytingar, sum heilt víst fara at koma limum okkara til góðar, nú fleiri og fleiri vísa seg hava trupult at fáa endarnar at røkka saman.





## Trygd á sjónum

Fiskimannafelagið og Skipaeftirlitið hava í gott 2 ár arbeitt tætt saman um trygd á sjónum. Millum annað eru spurnarbløð send út til allar limirnar, og ein áhugaverd frágreiðing varð gjørd um trygd á sjónum og hugburð til trygd á sjónum.

Tað órógvaði sera nógv, at alt ov fáar trygdarvenjingar verða gjørdar umborð, og at 3 av 4 sjómonnum vita ikki, hvar trygdarútgerð umborð er. Hetta má broyt-ast, vit mugu hvør í sínum lagi og sum felag krevja, at venjingar verða gjørdar regluliga, og at fólkið veit, hvar trygdar-útgerðin umborð er. Tað gleðiliga við kanningini vísti eisini, at sjófólkið var sera áhugað í spurninginum um trygd á sjónum.

Vit hava havt fundir við Skipaeftirlitið um, hvussu vit saman fáa bøtt um trygdina. Partarnir eru samdir um, at tað helst fer at taka nakað av tíð, innan alt riggar, sum tað skal. Men við miðvísum arbeiði skal tað bera á mál innan alt ov langa tíð.

## Eftirløn

Eftirlønin er ikki komin undir land enn, men vit arbeiða við spurninginum. Myndugleikarnir eru komnir við einum uppskoti, sum langt ífrá er liðugt. Vit hava saman við hinum feløgunum í Samtak, og partvís eisini landsfelag pensjónista, sent hoyringsskriv um pensjónirnar, kannað pensjónsviðurskifti hjá limunum, kannað skipanir uttanlands og hava sett serfrøð-ingar, ið eru óheftir av bankum og trygg-ingarfeløgum, at ráðgeva okkum um pen-sjónina.

Vit eru greið um, at í framtíðini fer størri og størri partur av pensjónini at vera uppsparing hjá okkum sjálvum, men vit mugu fáa eina skipan, sum er til frama fyri vanligt arbeiðsfólk bæði á sjógvi og landi. Tað halda vit ikki, at núverandi uppskot er, men vit ætla í felag at gera alt tað, vit eru ment, at fáa broytt uppskotið. Fíggjarmálaráðharrin hevur nevnt møgu-leikan at fáa eina serliga eftirløn fyri sjófólk, men vit hava ikki fingið nakað ítøkiligt at halda okkum til.



Eftirlønin hjá okkum er í løtuni 70 kr. um dagin, men eg haldi tað gerst greiðari og greiðari fyri allar okkara limir, at hetta er alt ov lítið. Jú fyrr vit byrja at spara upp, tess meir verður til okkara, tá ið vit gerast pensjónistar.

Tað er ikki nóg gott at fáa 70 kr. fyri hvønn mynstraðan dag í pensjón. Vit mugu leggja pensjónina um til eitt %-gjald, sum so líðandi skal hækka til 15%.

Eg kundi hugsa mær, at vit til komandi sáttmálasamráðing fingu gjørt eina langtíðaravtalu um pensjónina, soleiðis at tær 70 kr. verða umroknaðar til % - t.d. gerast 5%, og at pensjónin so veksur við 1-2% um árið, til hon er eini 15%–16%. Endamálið við pensjónini er at framtíðartryggja sjófólk og familjurnar, soleiðis at okkara limir ikki vera verri fyri, tá ið vit gerast pensjónistar.

Eg haldi tað er í lagi, at vit rinda nakað av pensjónini sjálvi – tað gera fleiri onnur feløg eisini – men vit skulu ikki rinda alla pensjón sjálvi. Eitt rímuligt býti hevði verið 25% til okkum og 75% til reiðaran. So mítt uppskot er, at okkara limir rinda 4% í eftirløn og reiðarin rindar 12% í eftirløn. Eg vóni, at hesin fundur kann geva okkum mandat ella áleggur okkum í nevndini eina skyldu at fáa hesi viðurskifti í rættlag undir teimum komandi sáttmálasamráðingunum.

Sum felag mugu vit eisini hugsa um, hvussu vit best kunnu røkja pensjónsáhugamálini hjá sjómonnunum, og tí eru vit í ferð við at kanna, hvørja skipan limirnir skulu hava framyvir. Framtíðarpensjónslóggávan fer eisini at seta ymisk krøv til pensjónina, so tað er greitt, at vit kunnu ikki halda fram við 60'ara kontunum, sum vit hava í dag.

## Sáttmálasamráðingar 2008/09

Til sáttmálasamráðingarnar seinast høvdu vit nøkur krøv mótvegis Føroya Reiðarafelag. Eitt av okkara kravum var at fáa eftirlønina í prosentum í staðin fyri eitt krónutal hvønn mynstraðan dag. Hetta var gjørt, so vit kundu vera innanfyri karmarnar, sum Fíggjarmálaráðið hevur lagt.

Vit høvdu eisini krøv um at hækka prosentbýtið fyri teir flestu veiðiháttirnar. Men vit vóru greiðir yvir, at hetta kom at verða trupult.







Føroya Reiðarafelag hevði sum mótkrav, at teir skuldu hava bíliga arbeiðsmegi umborð. Føroya Reiðarafelag legði stóran dent á júst hetta málið, so stóran dent, at tað gjørdist eitt ultimatum. Eftir hetta slitnaðu samráðingarnar, tí Føroya Fiskimannafelag visti gott, at góvu vit okkum á hesum økinum, so kom tað at hava við sær, at stóur partur av føroysku fiskimonnunum vórðu koyrdir í land til frama fyri útlendingar. Men slitið í samráðingahøpi má sigast at vera sera stutt, tí innan ein tíma ringdu teir frá Føroya Reiðarafelag og spurdu, um vit høvdu hug at leingja sáttmálan. Eftir at hava viðgjørt málið skjótt, játtaðu vit at leingja sáttmálan, sum hann stóð.

Føroya Reiðarafelag vildi eisini hava prosentbýtið niður, men Føroya Fiskimannafelag avvísti kravi teirra.

Spurningin um oljuna haldi eg, at vit hava víst reiðarafelagnum, at har vilja vit ikki luttaka, og tað tykjast teir at virða – tíbetur. Tí haldi eg framvegis, at tað var rætt, at vit fóru í verkfall á sinni.

Sáttmálin hesaferð varð eisini longdur – árið í ár hevur verið eitt rættiliga ringt ár fyri ein stóran part av flotanum, men tað er nakað, sum bendir á, at hetta verður betur komandi ár.

Tað er nógv tos um, at skipini eru í tungum sjógvi – hetta er eisini rætt, men bara partvíst. Tað er eisini ein sannroynd, at tað eru 100 tals milliónir tiknar úr vinnuni seinastu 10 árini í vinningsbýti, tí er ongin peningur á kistubotninum til at standa ímóti við, tá ið fiskiskapurin minkar. Tað er eisini serstakliga óheppið, at samfelagið hevur loyvt, at fiskiloyvini hava verið handlaði, sum tey hava. Hetta ger, at vit hava eina vinnu, sum er ógvuliga skuldarfongd.

Sjómaðurin hevur ikki fingið vinningin, tá ið stóru vinningsbýtini hava verið útgoldin, og tað er mín sannføring, at teir skulu ikki rinda prísin, um tað okkurt árið gongur eitt sindur verri. Vit hava gjørt okkara skyldu og skulu tí hava løn samsvarandi.

Tí skulu vit í framtíðarsáttmálasamráðingum heldur ikki halda okkum aftur at krevja okkara rætt.

## Royna at órógva arbeiðið í FF

Síðani fiskimenn valdu sær nýggjan formann fyri at bøta um teirra vána kor, hava kreftir av øllum alvi arbeitt ímóti, at fiskimenn fáa tað lættari. Endamálið tykist vera at løna fiskimonnum tað ilt aftur, at teir valdu nýggjan formann. Tað er serliga formaðurin, sum hevur staðið fyri skotum, men eisini aðrir limir hava verið lagdir undir stórt trýst. Men ein eigur ikki at lata seg kúga av slíkum kreftum, tí hetta má ein rokna við og eisini tola. Tí er tað nakað, fiskimenn hava brúk fyri, so er tað at vit í nevndini tora at standa móti trýstinum, so má tað vera líka mikið, um vit bløða persónliga.

Hetta eigur tó ikki at koma óvart á okkum. Longu í fyrstu formansfrágreiðingini varð sagt, at hetta helst fór at koma, og so hevur verið.

## Sáttmálabrot

Enn verða sáttmálarnir alt ov ofta brotnir. Tað gongur ofta rúm tíð, til manningarnar fáa tað, teir eiga. Vit mugu í heilum rykkja eftir hýru, og í nógvum førum skuldi hetta ikki verið neyðugt, tá reiðarin hevur peningin.

Sum felag mugu vit eggja sjómonnunum at vera raskari at boða frá, tá ið sáttmálin ella lógirnar verða brotnar. Vit fara í næstum eisini undir eina munandi kunningarherferð, so at sjófólkið betur kennir síni rættindi og sínar skyldur.

## FF-Húsið

Nú fer at líða heilt væl við arbeiðinum at gera FF-Húsið liðugt. Sum ætlað lat niðasta hædd upp 1. des. við eini kaffistovu, sum verður rikin av fólki uttanífrá. Vit vóna, at alt húsið er liðugt innrættað í februar. Vit fara at leiga 3 hæddir út, meðan ætlanin er at nýta ovastu hæddina sjálvir til virksemi felagsins.

## Inntøkutrygd og skattur

Tað hevur í longri tíð verið eitt miðvíst trýst á inntøkutrygdina og sjómannaskattin. Fiskimaðurin hevur verið fyri hørðum ágangi frá nógvum síðum. Tað tykist eisini sum, at fleiri í politisku skipanin kappast um at koma við uppskotum, sum kunnu gera korini hjá fiskimannafamiljunum munandi verri.

Vit sóu í uppskotinum til fíggjarlóg fyri komandi ár, at játtanin til minstulønina var als ikki nevnd í uppskotinum, og í august í ár var játtanin til minstuløn uppi. Tíbetur var hetta mál fingið upp á pláss.

Útsagnirnar eru, at sjómannaskatturin og minstalønin skal takast av. Lat meg bara gera tað heilt greitt, at tað verður ikki við mær sum formanni, at hetta fer at henda. Eg veit, at í hesum máli fara vit at standa saman sum ein maður. Felagið hevur fyrr verið í ógvusligum orrustum, og tað skulu vit ikki smæðast at endurtaka um neyðugt. Vit hava verið sera tolnir gjøgnum árini, men máti skal vera við.

Eg vildi ynskt, at landsins myndugleikar vendu sær til okkara við spurninginum, hvussu vit í felag kunnu betra kor fiskimanna. Tað tykist sum at øll halda, at sjófólk eru slík, sum forvinna milliónir og liva í sús og dús. Hetta er bara langt frá tí veruleika, sum eg upplivi hann. Vit kunnu eisini bara hyggja eftir hagtølunum fyri at staðfesta, at inntøkurnar hjá nógvum av limum okkara ikki eru stórt meir enn minstuløn. Og tað vita vit, at av minstuløn livur ongin eina greivatilveru – tvørturímóti.

## Skálaberg

Tað kom sera illa við, at Skálaberg varð tikin og førdur til Murmansk. Hetta hevur verið hart fyri manningina og teirra nærmastu. Vit hava í hesum sambandi sett okkum í samband við norðrara russiska fiskimannafelagið, og biðið teir trýst russisku myndugleikarnar, so at manningin slapp heim. Vit hava víst á, at Fiskimannafelagið bæði einsamalt og saman við øðrum, mangan hava hjálpt russiskum fiskimonnum, sum er sleptir uppá fjall av russiskum reiðarum. Tí vóna vit, at teir kenna tað sum eina skyldu at hjálpa manningini á Skálabergi.





## Endi

Eg vil annars takka fyri árið, sum fór. Tað hevur verið eitt gevandi ár, men eg síggi fyri mær stórar avbjóðingar í árunum, sum koma.

Tað er sera týdningarmikið at fáa loyst spurningin um eftirlønina – gongd er á einum greiningararbeiði – og eg vóni, hesin aðalfundur kann geva okkum í nevndini heimild at fáa eftirlønina upp á pláss og taka øll neyðug stig til tess undir komandi sáttmálasamráðingini.

Vit mugu fáa gjørt meir við spurningin um trygd á sjónum, meir upplýsing skal út til limirnar, eftirlitið skuldi møguliga verið hert, og minstakravið til reiðararnar má vera, at lógarásetingarnar í lógini um trygd á sjónum verða hildnar. Tíbetur, so eru føroyskir myndugleikar farnir undir arbeiðið við at gera munandi broytingar í lógunum, sum áseta rættindi hjá sjófólki – hetta er samsvarandi krøvum í altjóða ILO-sáttmálum. Hesum arbeiði fer Fiskimannafelagið at vera ein virkin partur av.

Tað má gerast lættari hjá sjófólki at fáa endurgjald, um teir hava verið fyri arbeiðsóhappi. Ein skipan má gerast fyri fólk, sum vegna slit ikki fáa verið til skips, men sum ikki eru nóg gamlir at gerast pensjónistar. Hetta arbeiða vit fyri skal gerast ein partur av nýggju pensjónsskipanini.

Spurningin um minstulønina mugu vit greina nærri. Tað er greitt, at vit fara ikki at góðtaka nakra skipan, har okkara limir ikki eru tryggjaðir eina inntøku fyri hvønn mynstraðan dag.

Førleikamenning av sjófólki er nakað, sum átti at staðið meir ovarlaga á breddanum í dagsins Føroyum. Tað eru alt ov fá tilboð til limir okkara um førleikamenningarskeið av ymiskum slagi. Tað mugu vit virka fyri at betra um. Sum fakfelag kunnu vit virka fyri at bjóða nøkur skeið sjálvi, men ein skipað førleikamenning má eisini vera ein almenn uppgáva – eins og tað er tað alla aðrastaðni.

Fiskimannafelagið fer í næstum undir eina kunningarherferð, har vit fara at upplýsa limirnar betri um rættindi teirra í sáttmálum, lógum og kunngerðum. Vit mugu eggja limunum í enn størri mun at seta seg í samband við fakfelagið, um okkurt ikki ruggar rætt. Eisini mugu vit fáa eina miðvísa útbúgving av álitisfólkunum, soleiðis at álitisfólkaskipanin fæst at rigga. Hava vit góð álitisfólk á skipunum, er hetta við til at tryggja okkara rættindi. Tað er trupult hjá hvørjum einstøkum at krevja sín rætt, men standa vit saman, so kunnu vit røkka langt – hetta hava vit sæð fyrr, og tað fara vit at prógva í framtíðini.

Sum fakfelag hava vit fleiri endamál, men høvuðsendamálið má vera at verja vunnin rættindi og betra um korini hjá fiskimanninum og familjum teirra. Hetta er eitt stríð, sum ongantíð verður liðugt, men við at standa saman sum felag og við at vera í felagsskapi við øðrum feløgum, so kunnu vit náa málum, ið vit fyrr hava hildið vóru ógjørlig.

## *Takk fyri og góðan aðalfund*

## Ráfiskaprísir

| | Sm. trolarar | St. trolarar | Línuskip |
|---|---|---|---|
| 1989 | 5,17 | 5,04 | 6,26 |
| 1990 | 5,13 | 5,17 | 6,37 |
| 1991 | 7,28 | 6,44 | 8,15 |
| 1992 | 5,74 | 6,43 | 9,78 |
| 1993 | 4,46 | 6,52 | 7,59 |
| 1994 | 4,39 | 7,24 | 8,38 |
| 1995 | 5,33 | 6,69 | 7,89 |
| 1996 | 5,32 | 8,09 | 7,65 |
| 1997 | 5,94 | 8,61 | 8,49 |
| 1998 | 7,17 | 9,51 | 10,89 |
| 1999 | 6,86 | 9,75 | 13,25 |
| 2000 | 7,30 | 10,86 | 14,43 |
| 2001 | 6,63 | 9,76 | 15,61 |
| 2002 | 6,30 | 8,72 | 13,22 |
| 2003 | 5,01 | 10,20 | 12,66 |
| 2004 | 4,90 | 10,27 | 10,88 |
| 2005 | 4,64 | 10,17 | 12,76 |
| 2006 | 5,97 | 9,11 | 14,71 |
| 2007 | 6,05 | 9,36 | 16,44 |
| 2008 | 5,57 | 9,60 | 14,12 |
| 2009 | 5,69 | 9,50 | 9,73 |

| Hækking/lækking | | | |
|---|---|---|---|
| 1989-2009 | 10% | 88% | 55% |
| 2007-2009 | -6% | 1% | -41% |
| 2008-2009 | 2% | -1% | -31% |





## Inntøkur fiskimanna

| Ár | Dg. | Fisk. part. | Frt. l. | Dagst. | Min. l. | Tils | Pr. dag kr. | Hækking/lækking í % 00/09 | 07/09 | 08/09 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Stórir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 242 | 356 | 44 | 11 | 447 | 411 | 1700 | 21,6% | 3% | 1% |
| 2008 | 188 | 304 | 37 | 4 | 3 | 345 | 1834 | | | |
| 2007 | 243 | 390 | 47 | 4 | 1 | 442 | 1816 | | | |
| 2006 | 251 | 395 | 48 | 4 | 0 | 447 | 1779 | | | |
| 2005 | 251 | 397 | 49 | 11 | 2 | 459 | 1824 | | | |
| 2004 | 267 | 379 | 46 | 7 | 1 | 433 | 1625 | | | |
| 2003 | 261 | 379 | 46 | 5 | 0 | 430 | 1652 | | | |
| 2002 | 289 | 444 | 54 | 2 | 0 | 500 | 1728 | | | |
| 2001 | 246 | 347 | 42 | 2 | 0 | 391 | 1584 | | | |
| 2000 | 275 | 341 | 41 | 2 | 0 | 384 | 1398 | | | |
| **Smáir ísfiskatrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 206 | 304 | 38 | 10 | 1 | 352 | 1709 | 1% | 3% | 3% |
| 2008 | 219 | 317 | 39 | 8 | 1 | 365 | 1664 | | | |
| 2007 | 258 | 374 | 46 | 6 | 0 | 426 | 1655 | | | |
| 2006 | 269 | 454 | 55 | 6 | 1 | 516 | 1948 | | | |
| 2005 | 271 | 380 | 47 | 11 | 1 | 439 | 1619 | | | |
| 2004 | 263 | 294 | 39 | 24 | 2 | 259 | 1365 | | | |
| 2003 | 224 | 280 | 35 | 14 | 1 | 330 | 1473 | | | |
| 2002 | 262 | 431 | 52 | 4 | 0 | 487 | 1855 | | | |
| 2001 | 247 | 416 | 50 | 1 | 1 | 468 | 1892 | | | |
| 2000 | 270 | 406 | 49 | 1 | 0 | 456 | 1694 | | | |
| **Ísfiskalínuskip** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 195 | 103 | 21 | 46 | 22 | 192 | 986 | -21% | -45% | -19% |
| 2008 | 203 | 189 | 27 | 26 | 8 | 250 | 1234 | | | |
| 2007 | 230 | 305 | 38 | 10 | 1 | 354 | 1803 | | | |
| 2006 | 229 | 287 | 36 | 11 | 1 | 335 | 1464 | | | |
| 2005 | 233 | 249 | 32 | 16 | 3 | 300 | 1290 | | | |
| 2004 | 231 | 249 | 33 | 19 | 3 | 304 | 1312 | | | |
| 2003 | 196 | 316 | 38 | 4 | 0 | 358 | 1826 | | | |
| 2002 | 222 | 340 | 41 | 4 | 0 | 385 | 1732 | | | |
| 2001 | 219 | 290 | 35 | 1 | 0 | 326 | 1483 | | | |
| 2000 | 215 | 239 | 29 | 1 | 0 | 269 | 1255 | | | |

## Inntøkur fiskimanna

| Ár | Dg. | Fisk. part. | Frt. l. | Dagst. | Min. l. | Tils | Pr. dag kr. | Hækking/lækking í % 00/09 | 07/09 | 08/09 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Hekkutrolarar á flakaveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 184 | 309 | 37 | 1 | 0 | 347 | 1893 | 8% | -32% | -26% |
| 2008 | 246 | 563 | 68 | 1 | 0 | 632 | 2574 | | | |
| 2007 | 310 | 764 | 92 | 3 | 0 | 859 | 2773 | | | |
| 2006 | 337 | 790 | 95 | 5 | 0 | 890 | 2641 | | | |
| 2005 | 253 | 454 | 55 | 1 | 0 | 510 | 2015 | | | |
| 2004 | 258 | 403 | 51 | 14 | 9 | 477 | 1844 | | | |
| 2003 | 262 | 411 | 52 | 16 | 6 | 485 | 1849 | | | |
| 2002 | 274 | 525 | 66 | 17 | 8 | 616 | 2252 | | | |
| 2001 | 290 | 451 | 56 | 12 | 1 | 520 | 1790 | | | |
| 2000 | 350 | 533 | 66 | 6 | 7 | 612 | 1746 | | | |
| **Garnaskip á svartkalva- og havtaskuveiðu** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 205 | 175 | 27 | 36 | 10 | 241 | 1208 | -32% | -33% | -9% |
| 2008 | 212 | 230 | 30 | 17 | 4 | 281 | 1323 | | | |
| 2007 | 265 | 421 | 51 | 9 | 2 | 483 | 1812 | | | |
| 2006 | 272 | 345 | 44 | 14 | 3 | 406 | 1742 | | | |
| 2005 | 309 | 398 | 51 | 24 | 8 | 481 | 1554 | | | |
| 2004 | 268 | 307 | 40 | 27 | 3 | 377 | 1409 | | | |
| 2003 | 227 | 271 | 34 | 14 | 2 | 321 | 1418 | | | |
| 2002 | 244 | 292 | 37 | 16 | 2 | 347 | 1421 | | | |
| 2001 | 267 | 401 | 48 | 1 | 0 | 450 | 1686 | | | |
| 2000 | 287 | 453 | 55 | 2 | 0 | 510 | 1775 | | | |





## Inntøkur fiskimanna

| Ár | Dg. | Fisk. part. | Frt. l. | Dagst. | Min. l. | Tils | Pr. dag kr. | Hækking/lækking í % 01/09 | 07/09 | 08/09 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Ídnaðarfiskitrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 90 | 188 | 23 | 6 | 2 | 219 | 2435 | 211% | -19% | -11% |
| 2008 | 152 | 361 | 44 | 4 | 4 | 414 | 2722 | | | |
| 2007 | 135 | 348 | 43 | 7 | 5 | 403 | 2992 | | | |
| 2006 | 135 | 262 | 37 | 25 | 19 | 343 | 2543 | | | |
| 2005 | 192 | 198 | 29 | 28 | 16 | 271 | 1410 | | | |
| 2004 | 135 | 191 | 26 | 18 | 8 | 243 | 1801 | | | |
| 2003 | 161 | 105 | 18 | 30 | 12 | 165 | 1026 | | | |
| 2002 | 149 | 133 | 20 | 20 | 12 | 185 | 1240 | | | |
| 2001 | 164 | 83 | 14 | 21 | 10 | 128 | 782 | | | |
| 2000 | – | – | – | – | – | – | – | | | |
| **Nótaskip** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 121 | 442 | 56 | 6 | 7 | 509 | 4209 | 9% | 0% | 5% |
| 2008 | 239 | 843 | 103 | 7 | 8 | 961 | 4021 | | | |
| 2007 | 280 | 1036 | 126 | 7 | 8 | 1177 | 4210 | | | |
| 2006 | 240 | 927 | 112 | 5 | 5 | 1049 | 4379 | | | |
| 2005 | 261 | 735 | 90 | 8 | 8 | 841 | 3222 | | | |
| 2004 | 288 | 639 | 79 | 12 | 5 | 735 | 2548 | | | |
| 2003 | 277 | 724 | 88 | 8 | 4 | 824 | 2970 | | | |
| 2002 | 237 | 785 | 95 | 5 | 2 | 887 | 3743 | | | |
| 2001 | 261 | 897 | 108 | 1 | 1 | 1007 | 3849 | | | |
| 2000 | 252 | 458 | 55 | 2 | 1 | 516 | 2048 | | | |
| **Rækjutrolarar** | | | | | | | | | | |
| 2009 | 241 | 430 | 52 | 4 | 3 | 490 | 2028 | 47% | 2% | 2% |
| 2008 | 367 | 654 | 79 | 1 | 0 | 733 | 1995 | | | |
| 2007 | 304 | 536 | 65 | 3 | 0 | 604 | 1989 | | | |
| 2006 | 239 | 315 | 38 | 5 | 0 | 358 | 1500 | | | |
| 2005 | 212 | 229 | 29 | 12 | 0 | 270 | 1271 | | | |
| 2004 | 328 | 340 | 43 | 21 | 1 | 405 | 1237 | | | |
| 2003 | 281 | 280 | 35 | 12 | 1 | 328 | 1166 | | | |
| 2002 | 303 | 315 | 40 | 16 | 3 | 374 | 1234 | | | |
| 2001 | 302 | 291 | 37 | 15 | 5 | 348 | 1152 | | | |
| 2000 | 265 | 324 | 39 | 3 | 0 | 366 | 1380 | | | |

## Gongdin í daginntøkuni hjá ísfiskamonnum sammett við daglønir á landi 1989-2009

| Ár | Tíma-løn | Dagløn 8 tímar | Daglønir, alt íroknað og lutfall við daglønir á landi | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | Ísfiskalínuskip | | Stórir ísfiskatrol. | | Smáir ísfiskatrol. | |
| 1989 | 81,30 | 650 | 1015 | 1,6 | 912 | 1,4 | 962 | 1,5 |
| 1990 | 84,24 | 674 | 872 | 1,3 | 989 | 1,5 | 992 | 1,5 |
| 1991 | 84,93 | 679 | 829 | 1,2 | 1120 | 1,6 | 1193 | 1,8 |
| 1992 | 84,93 | 679 | 781 | 1,2 | 980 | 1,4 | 911 | 1,3 |
| 1993 | 83,64 | 669 | 702 | 1,0 | 818 | 1,2 | 837 | 1,3 |
| 1994 | 83,64 | 669 | 772 | 1,2 | 815 | 1,2 | 867 | 1,3 |
| 1995 | 83,64 | 669 | 756 | 1,1 | 831 | 1,2 | 940 | 1,4 |
| 1996 | 83,64 | 669 | 853 | 1,3 | 905 | 1,4 | 1052 | 1,6 |
| 1997 | 84,96 | 680 | 1085 | 1,6 | 966 | 1,4 | 1109 | 1,6 |
| 1998 | 85,81 | 687 | 1539 | 2,2 | 1239 | 1,8 | 1676 | 2,4 |
| 1999 | 89,79 | 718 | 1417 | 2,0 | 1200 | 1,7 | 1460 | 2,0 |
| 2000 | 93,77 | 750 | 1255 | 1,7 | 1398 | 1,9 | 1694 | 2,3 |
| 2001 | 98,52 | 788 | 1484 | 1,9 | 1584 | 2,0 | 1892 | 2,4 |
| 2002 | 103,26 | 826 | 1732 | 2,1 | 1728 | 2,1 | 1855 | 2,2 |
| 2003 | 108,08 | 865 | 1826 | 2,1 | 1652 | 1,9 | 1473 | 1,7 |
| 2004 | 112,90 | 903 | 1326 | 1,5 | 1577 | 1,8 | 1358 | 1,5 |
| 2005 | 112,90 | 903 | 1290 | 1,4 | 1824 | 2,0 | 1619 | 1,8 |
| 2006 | 112,90 | 903 | 1464 | 1,6 | 1779 | 1,9 | 1948 | 2,2 |
| 2007 | 117,07 | 937 | 1536 | 1,6 | 1815 | 1,9 | 1655 | 1,8 |
| 2008 | 119,67 | 957 | 1234 | 1,3 | 1820 | 1,9 | 1609 | 1,7 |
| 2009 | 122,38 | 979 | 986 | 1,0 | 1699 | 2,0 | 1708 | 2,0 |

Í tímalønini er rokna frítíðarløn. Í daglønum hjá fiskimonnum eru íroknaðar allar viðbøtur. Fyri 2009 er lutvíst gjørt upp inntøkan higartil í 2009 og lutvíst tann inntøka, sum roknast kann við við verandi veiðu og prísum. Tað, sum fiskimenn fáa útyvir eina dagløn á landi (t.v.s tað, sum er útyvir 1 í tavluni), er tann viðbót, sum fiskimenn fáa fyri teirra arbeistíð útyvir 8 tímar, fyri at arbeiða allar dagar í vikuni v.m.





## Gongd í veiðu og veiðusamanseting

Vit hava síðan 1975 gjørt upp gongdina í veiðu og veiðusamanseting hjá ísfiskaskipum. Gongdin síðan 1993 hevur verið henda:

### Smáir trolarar

| (í %) | | -09 | -08 | -07 | -06 | -05 | -04 | -03 | -02 | -01 | -00 | -99 | -98 | -97 | -96 | -95 | -94 | -93 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tosk | 1 partr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 1 | 2 | 4 | 6 | 4 | 6 | 3 |
| – | 1 lem.tr. | 0 | 0 | 1 | 1 | 25 | 23 | 41 | 62 | 58 | 64 | 31 | 45 | 20 | 5 | 2 | 3 | 2 |
| Tosk | 2 partr. | 1 | 2 | 2 | 2 | 2 | 7 | 5 | 6 | 7 | 8 | 7 | 14 | 16 | 5 | 2 | 2 | 2 |
| – | 2 lem.tr. | 0 | 0 | 17 | 21 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 22 | 14 | 6 | 1 | 1 |
| Hýsa | partr. | 2 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 6 | 6 | 5 | 8 | 8 | 9 | 8 | 4 | 3 | 4 | 3 |
| – | lem.tr | 0 | 0 | 43 | 23 | 27 | 25 | 27 | 28 | 32 | 26 | 34 | 41 | 32 | 10 | 4 | 1 | 1 |
| Upsi | partr. | 91 | 91 | 90 | 90 | 76 | 72 | 64 | 63 | 61 | 60 | 60 | 43 | 41 | 65 | 62 | 70 | 74 |
| – | lem.tr | 0 | 0 | 8 | 15 | 8 | 9 | 3 | 1 | 2 | 1 | 24 | 0 | 0 | 12 | 15 | 20 | 21 |
| Kongaf. | partr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 3 | 3 | 3 | 2 | 3 | 4 |
| – | lem.tr | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 4 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 27 | 26 | 45 | 49 |
| Blálon. | partr. | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 1 | 2 |
| – | lem.tr | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 8 | 10 | 8 | 8 |
| Annað | partr. | 6 | 5 | 5 | 6 | 20 | 15 | 23 | 23 | 25 | 21 | 22 | 31 | 30 | 19 | 22 | 15 | 13 |
| – | lem.tr | 0 | 0 | 31 | 40 | 40 | 39 | 28 | 9 | 8 | 9 | 11 | 14 | 26 | 24 | 37 | 22 | 12 |
| Íalt % | | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

### Stórir trolarar

| (í %) | -09 | -08 | -07 | -06 | -05 | -04 | -03 | -02 | -01 | -00 | -99 | -98 | -97 | -96 | -95 | -94 | -93 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | 0 | 1 | 0 | 1 | 1 | 1 | 1 | 1 | 2 | 3 | 1 | 4 | 3 | 1 | 3 | 2 | 1 |
| Toskur 2 | 2 | 10 | 8 | 6 | 21 | 19 | 18 | 4 | 6 | 14 | 9 | 7 | 8 | 4 | 3 | 2 | 0 |
| Hýsa | 1 | 1 | 2 | 1 | 1 | 1 | 2 | 7 | 3 | 3 | 7 | 2 | 2 | 0 | 0 | 1 | |
| Blálonga | 4 | 3 | 4 | 7 | 6 | 6 | 10 | 3 | 7 | 7 | 11 | 5 | 5 | 7 | 7 | 7 | 12 |
| Upsi | 51 | 54 | 57 | 53 | 44 | 25 | 29 | 45 | 44 | 30 | 22 | 28 | 11 | 4 | 10 | 8 | 9 |
| Kongafiskur | 8 | 6 | 5 | 13 | 11 | 18 | 11 | 11 | 23 | 27 | 34 | 37 | 44 | 54 | 57 | 55 | 48 |
| Svartkalvi | 11 | 3 | 2 | 3 | 2 | 3 | 2 | 2 | 4 | 7 | 6 | 5 | 12 | 16 | 8 | 10 | 3 |
| Stinglaksur | 6 | 6 | 3 | 3 | 2 | 5 | 8 | 5 | 2 | 1 | 0 | 1 | 1 | 2 | 2 | 5 | 11 |
| Annað | 17 | 16 | 19 | 13 | 12 | 22 | 19 | 22 | 9 | 8 | 8 | 11 | 14 | 12 | 10 | 10 | 16 |
| Íalt % | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |

## Línuskip

| (í %) | -09 | -08 | -07 | -06 | -05 | -04 | -03 | -02 | -01 | -00 | -99 | -98 | -97 | -96 | -95 | -94 | -93 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur 1 | | 5 | 4 | 4 | 5 | 6 | 14 | 9 | 8 | 13 | 15 | 21 | 21 | 15 | 16 | 20 | 10 |
| Toskur 2 | | 23 | 24 | 20 | 18 | 23 | 27 | 35 | 26 | 17 | 15 | 18 | 26 | 27 | 13 | 3 | 6 |
| Hýsa | | 19 | 33 | 36 | 45 | 39 | 38 | 37 | 35 | 40 | 41 | 39 | 29 | 20 | 16 | 14 | 21 |
| Blálonga | | 2 | 16 | 15 | 10 | 11 | 7 | 9 | 14 | 14 | 13 | 10 | 10 | 13 | 24 | 29 | 35 |
| Kongafiskur | | 1 | 13 | 15 | 11 | 11 | 6 | 5 | 8 | 8 | 9 | 9 | 10 | 11 | 16 | 15 | 16 |
| Svartkalvi | | 1 | 2 | 1 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 2 | 4 |
| Stinglaksur | | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 1 | 9 | 11 |
| Annað | | 49 | 8 | 9 | 11 | 10 | 8 | 5 | 9 | 8 | 7 | 3 | 4 | 14 | 13 | 8 | 3 |
| Íalt % | | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 | 100 |







# Gongdin í ísfiskaveiðuni

## Línuskip

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. mann pr. dag |
|---|---|---|---|
| 1979 | 3400 | 15 | 227 |
| 1980 | 3600 | 15 | 240 |
| 1981 | 3900 | 15 | 260 |
| 1982 | 3800 | 15 | 253 |
| 1983 | 3900 | 15 | 260 |
| 1984 | 3900 | 15 | 260 |
| 1985 | 3800 | 15 | 253 |
| 1986 | 3500 | 14 | 250 |
| 1987 | 3600 | 14 | 257 |
| 1988 | 3400 | 13,3 | 256 |
| 1989 | 3600 | 14 | 257 |
| 1990 | 3100 | 14 | 221 |
| 1991 | 2600 | 14 | 186 |
| 1992 | 2300 | 14 | 164 |
| 1993 | 2250 | 14 | 161 |
| 1994 | 2760 | 14 | 197 |
| 1995 | 2830 | 14 | 202 |
| 1996 | 3720 | 14 | 266 |
| 1997 | 4500 | 14 | 321 |
| 1998 | 4800 | 14 | 343 |
| 1999 | 3750 | 13,8 | 272 |
| 2000 | 3020 | 13,7 | 220 |
| 2001 | 3340 | 13,6 | 246 |
| 2002 | 4519 | 13,6 | 332 |
| 2003 | 5184 | 14,1 | 368 |
| 2004 | 4342 | 13,9 | 312 |
| 2005 | 3722 | 13,8 | 270 |
| 2006 | 3581 | 13,6 | 263 |
| 2007 | 3313 | 13,4 | 247 |
| 2008 | 3069 | 13,4 | 229 |
| 2009 | 3038 | 13,6 | 223 |

## Smáir trolarar

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. mann pr. dag |
|---|---|---|---|
| 1978 | 3200 | 6,5 | 492 |
| 1979 | 3100 | 7 | 443 |
| 1980 | 3400 | 6,5 | 523 |
| 1981 | 3500 | 6,5 | 538 |
| 1982 | 3700 | 6,5 | 570 |
| 1983 | 4700 | 7 | 670 |
| 1984 | 4800 | 7,4 | 649 |
| 1985 | 4170 | 7,4 | 565 |
| 1986 | 5500 | 7,6 | 720 |
| 1987 | 4700 | 7,6 | 620 |
| 1988 | 5100 | 7,6 | 671 |
| 1989 | 3800 | 7,4 | 507 |
| 1990 | 4100 | 7,8 | 526 |
| 1991 | 4900 | 8,7 | 561 |
| 1992 | 4000 | 8,7 | 454 |
| 1993 | 3420 | 8,4 | 407 |
| 1994 | 3130 | 8,5 | 368 |
| 1995 | 2765 | 7 | 395 |
| 1996 | 3137 | 6,7 | 468 |
| 1997 | 3950 | 5,0 | 790 |
| 1998 | 4900 | 5,0 | 984 |
| 1999 | 3344 | 4,9 | 682 |
| 2000 | 4595 | 5 | 919 |
| 2001 | 4013 | 5 | 803 |
| 2002 | 4588 | 5 | 918 |
| 2003 | 2769 | 5 | 554 |
| 2004 | 2505 | 4 | 626 |
| 2005 | 2867 | 5 | 573 |
| 2006 | 2992 | 5 | 598 |
| 2007 | 2880 | 5 | 576 |
| 2008 | 1851 | 5 | 370 |

## Partrolarar

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. mann pr. dag |
|---|---|---|---|
| 1987 | 3400 | 6,2 | 548 |
| 1988 | 3300 | 6 | 550 |
| 1989 | 3200 | 5,9 | 542 |
| 1990 | 3300 | 6 | 550 |
| 1991 | 2900 | 5,8 | 500 |
| 1992 | 2900 | 6,2 | 468 |
| 1993 | 3350 | 6,4 | 523 |
| 1994 | 3860 | 6,6 | 585 |
| 1995 | 3846 | 7,3 | 527 |
| 1996 | 4012 | 6,4 | 627 |
| 1997 | 3995 | 6,5 | 615 |
| 1998 | 4900 | 6,5 | 754 |
| 1999 | 4800 | 6,5 | 738 |
| 2000 | 5305 | 6,5 | 816 |
| 2001 | 6587 | 6,5 | 1013 |
| 2002 | 6878 | 6,5 | 1058 |
| 2003 | 6790 | 6,5 | 1045 |
| 2004 | 6234 | 6,5 | 959 |
| 2005 | 8276 | 6,5 | 1273 |
| 2006 | 7637 | 6,4 | 1193 |
| 2007 | 6410 | 6,4 | 1002 |
| 2008 | 6881 | 6,4 | 1075 |
| 2009 | 7142 | 6,5 | 1099 |

*Tølini fyri 2009 eru fyribilstøl, gjørd upp eftir avrokningum, sum eru innkomnar pr. 15/12-2009*

## Stórir trolarar

| Ár | Veiða pr. dag | Menn | pr. mann pr. dag |
|---|---|---|---|
| 1980 | 7900 | 13 | 608 |
| 1981 | 6800 | 13 | 523 |
| 1982 | 6400 | 13 | 492 |
| 1983 | 8700 | 12 | 725 |
| 1984 | 8300 | 12 | 692 |
| 1985 | 6670 | 12 | 556 |
| 1986 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1987 | 6800 | 12,4 | 548 |
| 1988 | 6700 | 12,6 | 532 |
| 1989 | 5700 | 12,1 | 471 |
| 1990 | 6400 | 12 | 533 |
| 1991 | 6600 | 12 | 550 |
| 1992 | 5800 | 12,4 | 468 |
| 1993 | 4740 | 12,8 | 370 |
| 1994 | 4460 | 12,9 | 346 |
| 1995 | 4774 | 12,7 | 376 |
| 1996 | 4492 | 12,5 | 359 |
| 1997 | 4287 | 11,6 | 370 |
| 1998 | 4841 | 11,3 | 428 |
| 1999 | 4656 | 11,1 | 419 |
| 2000 | 4880 | 10,7 | 456 |
| 2001 | 6131 | 10,6 | 578 |
| 2002 | 7731 | 10,6 | 729 |
| 2003 | 6055 | 10,5 | 577 |
| 2004 | 5603 | 10,2 | 549 |
| 2005 | 6208 | 10,1 | 615 |
| 2006 | 6752 | 9,9 | 682 |
| 2007 | 6640 | 9,7 | 685 |
| 2008 | 6272 | 9,6 | 653 |
| 2009 | 6191 | 9,6 | 645 |





## Avreiðingarprísir 1997-2008

| | -98 | -99 | -00 | -01 | -02 | -03 | -04 | -05 | -06 | -07 | -08 | -09 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 1514 | 1496 | 1763 | 1811 | 1344 | 1407 | 1455 | 1676 | 1849 | 2270 | 2077 | 1293 |
| Hýsa | 1122 | 1278 | 1254 | 1390 | 1013 | 729 | 790 | 1019 | 871 | 1132 | 1177 | 778 |
| Brosma | 755 | 889 | 921 | 795 | 627 | 538 | 479 | 514 | 648 | 691 | 641 | 465 |
| Longa | 993 | 1370 | 1342 | 1581 | 993 | 802 | 709 | 821 | 962 | 1035 | 1265 | 625 |
| Upsi | 764 | 508 | 498 | 492 | 504 | 359 | 340 | 410 | 460 | 509 | 420 | 493 |
| Kalvi | 4338 | 4045 | 6048 | 4650 | 5800 | 5412 | 3776 | 4060 | 4141 | 4474 | 3784 | 3137 |
| Kongafiskur | 922 | 794 | 971 | 928 | 722 | 561 | 619 | 726 | 812 | 805 | 849 | 658 |
| Blálonga | 842 | 852 | 885 | 926 | 771 | 633 | 561 | 938 | 1041 | 1098 | 844 | 635 |
| Svartkalvi < 3 kg | 1468 | 1365 | 1787 | 1761 | 1536 | 1564 | 1305 | 1557 | 1799 | 2128 | 1965 | 1572 |

*Tølini fyri tosk, hýsu og upsa frá 1999 eru miðalprísir fyri allar støddir*





**Føroya Fiskimannafelag**
Tlf. 31 15 69   Fax 31 87 69
fo-fisk@post.olivant.fo
www.fiskimannafelag.fo